# Yvirnátta í Guds fríðu náttúru

Setir tú ikki tey stóru krøvini til at yvirnátta, kann ein búgva bæði einfalt, bíligt og friðarligt á einum av teimum 900 náttúru-leguplássunum kring alt Danmark. Felagsheiti teirra er "Overnatning i det fri".

Ymiskt er, hvussu fólk raðfesta, tá tey velja sær eitt stað at yvirnátta undir eini feriu uttanlands.

Nøkur vilja búgva á støðum við góðari komfort, meðan onnur velja eitt tjaldingarstað ella eitt náttúru-legupláss.

Á teimum 900 plássunum kann ein ókeypis ella fyri 20 krónur seta tjaldið upp á hesum støðum.

Lagt verður kortini aftrat, at hvørki bilar, kampingvognar, húsvognar, motorsúkklur ella prutl hava atgongd til hesi støðini, og heldur ikki bátar við motori.

Skipanin er hon, at ein kann í mesta laga búgva tvær nætur á sama staði. Ofta er møguleiki at fáa reint vatn ella eitt toilett, men ikki allastaðni.

Eitt yvirlit vísir haraftrat, at á umleið 300 av hesum plássum er sett upp eitt sonevnt "shelter", sum er ein trækonstruksjón við trimum síðum, sum geva lívd fyri vindi og veðri.

Henda skipanin hevur eina heimasíðu – www.teldpladser.dk – har ein kann finna yvirlit yvir støð, prísir, tænastur og annað.

Víst kann eisini verða til eina aðra heimasíðu – www.udinaturen.



**PRIMITIVT**

*Hevur tú hug at seta tjøldini upp og liva primitivt, er eisini møguleiki til hetta á 900 ymiskum støðum kring alt Danmark*



**NÁTTÚRA**

*Nógvir møguleikar eru fyri stórum upplivingum í donsku náttúruni*

LESKILIGT OG GOTT FRÁ SMYRJIBREYÐSBÚÐINI



Smyrjibreyðsbúðin
Bøgøta 14 · 100 Tórshavn · tel 32 16 18

**Opið er soleiðis:**
**Mánadag – fríggjadag:** 8:00 – 17:30